



















*Klædnaskápið hjá Guðruni Ludvig:*

# – FEMININT, RÁTT OG ROMANTISKT

**Lív Højsted Horsdal**
**horsdal@sosialurin.fo**

Guðrun Ludvig hevur nomið sær útbúgving sum sniðgevi og er onnur kvinnan aftan fyri klædnamerkið Guðrun & Guðrun, ið framleiða hondbundin klæðir og klæðir úr føroyskum skinni.

Guðrun & Guðrun selja sítt klædnamerki nógvastaðni uttanlands. - Fyri tað mesta í Japan, men eisini í New York, Los Angeles, París, Milano, Norra, Svøríki og Danmark. Fyri tveimum vikum síðani vóru Guðrun & Guðrun eisini í París og sýndu klæði fram á stórari klædnamessu.

Guðrun & Guðrun koma út við vørusendingum tvær ferðir um árið – um summarið og um veturin. Og fyri kortum hava tær eisini latið upp egið verkstað í Dr. Jakobsensgøtu í Havn, so føroyingar eisini fáa ágóðan av klæðunum.

**Hvat eyðkennir títt klædnaskáp?**

*Eg havi ongan eyðkendan stíl, og í klædnaskápinum eru øll sløg av klæðum. Bæði rá, romantisk, feminin og ítróttarlig klæðir. Síðan seti eg hesi klæðini saman á mín egna máta. Eg fari eitt nú ongantíð og keypi mær nýggj klæðir frá høvur til fót, men finni heldur nøkur ting, ið eg altíð kann brúka aftur. Og um eg ikki lati meg í tey, eru tey til pynt og geva mær íblástur til arbeiðið. Eg havi eitt nú stutt síðan keypt mær einar skógvar, eg frammanundan visti, eg ongantíð fór í. Men nú standa teir í durinum til pynt og geva mær íblástur.*

**Hvat er nýggjasta plaggið?**

Einir skógvar úr handlinum Wood Wood í Keypmannahavn og einir adidas løriftskógvar. Eg átti einar tílíkar svartar og hvítar fyri 10 árum síðani, men teir gav eg systur míni, tá eg fann hesar. Mær dámar teir sera væl.

**Besta keypið?**

*Tað er avgjørt ein troyggja, eg einaferð keypti í Blákrossbúðini fyri 10 kr. Hon er lekkur, spennandi og úr góðari góðsku. Eg havi átt hana í fleiri ár og fari altíð í hana 1-2 ferðir um árið saman við kovboybuksum. Somuleiðis havi eg ein hvítan kjóla, eg havi fingið frá danska sniðgevanum, Mariu Møller, fyri eitt plagg, eg havi gjørt.*

**Yndisplagg?**

*Hóast eg sjálv ikki gangi ofta í kjóla, elski eg kjólar. Serliga dámar mær væl ein kjóla, eg keypti, tá sonur mín varð doyptur. Hann hongur í løtuni til pynt, og eg fari altíð at vera serliga góð við hann. Eisini dámar mær væl ein ljósareyðan kjóla, eg havi keypt í einum innflytarahandli í Keypmannahavn. Kjólin var av fyrstan tíð ein indiskur kvinnubúni, men eg havi seymað hann um.*

**Hvar keypir tú helst klæði?**

*Eg keypi mest í Danmark hjá einum sniðgeva, ið kallast Sabine Poupinel ella í Wood Wood. Annars eri eg 2-3 ferðir um árið á handilsferð, og tá geri eg eitt rimmarkeyp. Tá eg keypi í Føroyum, keypi eg í Juniik.*